# Fyrireiking til 1. januar 2021

10 spurningar, tú sum dátuábyrgdari eigur at seta tær sjálvum

Dátueftirlitið

**Innleiðsla**

**Í hesum skjali verða settir 10 spurningar, sum tú, sum dátuábyrgdari eigur at seta tær sjálvum í fyrireikingini til dátuverndarlógin kemur í gildi 1. janaur 2021.**

Løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin) kemur í gildi 1. januar 2021. Dátuverndarlógin kemur í staðin fyri løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, sum samstundis fer úr gildi.

Dátuverndarlógin er í høvuðsheitum grundað á ES fyriskipanina um viðgerð av persónupplýsingum (Generel Data Protecion Regulation – GDPR), sum kom í gildi í ES 25. mai 2018.

Nógvar av reglunum í dátuverndarlógini føra víðari galdandi rætt, tó at onkur nýbrot eru. Fylgir tú sum dátuábyrgdari galdandi løgtingslóg, er hetta eitt gott útgangsstøði fyri at tú kanst tryggja, at tann fyritøka ella stovnur, sum tú stendur á odda fyri, kann lúka reglurnar í nýggju løgtingslógini.

Tað er umráðandi, at tú í góðari tíð setur teg inn í, hvussu og hvørjar persónupplýsingar tit viðgera, og hvussu tú kanst tryggja, at dátuverndarlógin verður fylgd, tá hon kemur í gildi.

Hetta skjal kann nýtast sum ein minnislisti, tá tú yvirskipað vil hava greiðu á nýggju reglunum, og hvussu nýggja løgtingslógin fer at ávirka tín stovn ella fyritøku.

**Dátuábyrgdari**

Ofta ein fyritøka ella ein myndugleiki, sum eina ella saman við øðrum ger av til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast.

**1. Kenna tit dátuverndarlógina?**

**Tit eiga at tryggja, at tey sum taka avgerðir og lyklapersónar annars eru tilvitað um, at ein nýggj løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021. Tit eiga eisini at kanna, hvussu tykkara fyritøka ella stovnur verða ávirkað av løgtingslógini og eyðmerkja tey øki, sum tit serliga skulu arbeiða við.**

Tað kann verða tørvur á, at tit seta tíð og orku av fyri at verða klár 1. januar 2021, tá nýggja løgtingslógin kemur í gildi. Í fyrstu syftu er umráðandi alment at økja um tilvitanina um dátuverndarøkið og nýggju løgtingslógina. Tað kann verða trupult at lúka treytirnar í løgtingslógini, um tit byrja arbeiðið í síðstu løtu.

Á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum liggur ein vegleiðing um dátuverndarlógina, sum gevur eina yvirskipaða innleiðslu til reglurnar. Fleiri vegleiðingar verða lagdar út fyri 1. januar 2021.

**2. Hvørjar persónupplýsingar viðgera tit?**

**Tit eiga at kanna, hvørjar persónupplýsingar tit viðgera, hvaðani upplýsingarnar stava, og hvønn tit senda upplýsingarnar víðari til. Í stórum fyritøkum og stovnum kann verða neyðugt at gjøgnumganga alla organisatiónina og fáa greiðu á, hvørjar persónupplýsingar viðgerast í einkultu pørtunum av organisatiónini.**

Um tit ikki hava greiðu á, hvørjar persónupplýsingar til viðgera, til hvørji endamál og hvønn tit deila hesar upplýsingar við, verður tað torført at fylgja reglunum í dátuverndarlógini. T.d. setur dátuverndarlógin krav um, at dátuábyrgdarin skal geva øllum móttakarum boð, um persónupplýsingar verða rættaðar. Hetta er torført, um tú ikki veit, hvønn tit geva upplýsingar víðari til.

Fáa tit greiðu á, hvørjar upplýsingar tit viðgera o.s.fr. lættir hetta eisini um, tá tit skulu lúka kravið um yvirlit yvir viðgerðir.

**3. Hvørja kunning geva tit skrásettum?**

**Tit eiga at at fáa greiðu á, hvørja kunning tit geva skrásettum, tá upplýsingar vera savnaðar, og geva gætur um hetta livir upp til krøvini í dátuverndarlógini.**

Tá persónupplýsingar verða savnaðar er longu krav í persónsupplýsingarlógini um, at tann skrásetti skal kunnast um ymiskt viðurskifti, m.a. um, hvør tú ert, og hví upplýsingarnar verða savnaðar.

Dátuverndarlógin hevur fleiri krøv til, hvørjar upplýsingar tann skrásetti skal hava, tá persónupplýsingar verða savnaðar. M.a. skulu tit eftir nýggju løgtingslógini – umframt at upplýsa, hvør tú ert og hví upplýsingarnar verða savnaðar – upplýsa, hvør heimildin fyri viðgerðini er. Eisini skulu tit í ávísum førum

upplýsa, at skrásetti kann kæra til Dátueftirlitið um viðkomandi heldur, at viðgerðin ikki er í samsvari við løgtingslógina.

Dátuverndarlógin setur eisisni krav um, at allar upplýsingar um viðgerð av persónupplýsingum, sum verða latnar skrásetta eftir løgtingslógini, verða latnar á ein stuttorðaðan, gjøgnumskygdan, lætt skilligan og lætt atkomiligan hátt.

Dátueftirlitið arbeiðir við eini skabelón, sum kann brúkast til at lúka kravið um kunning.

**4. Hvussu uppfylla tit rættindini hjá teimum skrásettu?**

**Tit eiga at kanna um tit hava mannagongdir, sum tryggja, at rættindini hjá teimum skrásettu verða fylgd.**

Í høvuðsheitum hava tey skrásettu somu rættindi í dátuverndarlógini, sum tey longu hava í dag. Rættindini verða tó styrkt við nýggju løgtingslógini. Um tit hava skil á rættindinum hjá teimum skrásettu í dag, eru tit væl áleiðis.

Tey mest umráðandi rættindini eftir dátuverndarlógini eru hesi:

- Rætturin til kunning
- Rætturin til innlit
- Rætturin til rætting
- Rætturin til striking
- Rætturin til mótmæli
- Rætturin at seta seg ímóti automatiskum avgerðum

Tað er eitt gott hugskot at gjøgnumganga tær mannagongdir, sum tit hava, og t.d. hugsa um, hvussu tit handfara eina umbøn um rætting ella striking frá einum skrásettum. Ber tað til hjá tykkum at finna persónupplýsingina fram? Hvør tekur sær av hesum í verki?

**5. Hvør er heimildin fyri viðgerðini, sum fer fram?**

**Tit eiga at kanna, hvørji sløg av persónupplýsingum tit viðgera, og hvørja viðgerarheimild henda viðgerð er grundað á. Samstundis eiga tit at skjalprógva tykkara niðurstøður.**

Tá persónupplýsingar verða viðgjørdar er altíð krav um, at dátuábyrgdarin hevur eina viðgerðarheimild. Í feiri førum hevur dátuábyrgdarin ikki gjørt sær greitt, hvør hendan heimildin er.

Um tit eru í iva um, hvat ein viðgerðarheimild er, sí vegleiðingina Dátuverndarlógin, Innleiðsla til reglurnar í dátuverndarlógini, sum kemur í gildi 1. januar 2021, sum liggur á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum.

Í dátuverndarlógini er krav um, at tit skulu kunna tann skrásetta um, hvør heimildin fyri viðgerðini er. Tí er tað umráðandi, at tit áðrenn viðgerð fer í gongd, gera tykkum greitt, hvør heimildin er.

Harumframt kunnu rættindini hjá skrásetta variera alt eftir, hvat grundarlagið fyri viðgerðini er. T.d. hevur skrásetti eitt greiðari krav um striking, um viðgerðin er grundað á samtykki enn um viðgerðin er grundað á lóggávu.

Tá tit hava mett um, hvat grundarlagið fyri viðgerðini er, eiga tit at skjalprógva niðurstøðurnar, so at tað verður lættari at vísa á, at tit fylgja reglunum í dátuverndarlógini.

**6. Hvussu fáa tit samtykki frá skrásetta?**

**Tit eiga at kanna, hvussu tit fáa samtykki frá skrásetta, hvussu tit goyma og skjalprógva samtykki, og um broytingar skulu gerast í hesum mannagongdum.**

Eitt samtykki skal fyri at verða galdandi verða eitt sjálvboðið, nágreiniligt, kunnað og greitt viljaboð frá skrásetta, har skrásetti við fráboðan ella greiðari váttan játtar, at persónupplýsingar, um viðkomandi kunnu viðgerast.

Um tit brúka samtykki sum viðgerðargrundarlag, eiga tit at tryggja at tykkara samtykki livir upp til krøvini í dátuverndarlógini. Tit eiga at gera greitt, um tillagingar skulu gerast í tykkara mannagongdum ella um tit skulu nýta eitt annað viðgerðargrundarlag.

Dátuverndarlógin setur krav um, at um tit viðgera persónupplýsingar grundað á samtykki, skulu tit kunna vísa á, at tann skrásetti hevur givið samtykki til viðgerðina. Hetta er ikki eitt treytaleyst krav um, at samtykki skal verða skrivligt, um tit á annan hátt kunnu vísa á, at samtykki er givið.

**7. Hvat gera tit um brot er á persóndátutrygdina?**

**Tit eiga at tryggja tykkum, at tit hava greiðar mannagongdir fyri at finna, boða frá og kanna brot á persóndátutrygdina.**

Dátuverndarlógin hevur reglur um, hvat tit skulu gera, um tit eru fyri einum trygdarbroti. Tað kann t.d. verða eitt innbrot í teldukervi (hacking) ella um tit á annan hátt missa ræði á persónupplýsingum, sum tit viðgera.

Eftir dátuverndarlógini skulu tit skjalfesta øll brot á persóndátutrygdina. Harumframt skulu tit uttan óneyðugt drál og um gjørligt innan 72 tímar boða Dátueftirlitinum frá hesum. Bara um tað er ósannlíkt at brotið hevur við sær váða fyri tann skrásetta, sleppa tit undan fráboðan.

Hevur brotið við sær ein stóran váða fyri tann skrásetta, skulu tit eisini uttan óneyðugt drál boða skrásetta frá brotinum. Ein stórur váði fyri tann skrásetta er t.d. um vandi er fyri samleikastuldri ella svikagerðum (bedrageri).

Fyri at fylgja reglunum í dátuverndarlógini um trygd og trygdarbrot, er neyðugt at tit hava greiðar mannagongdir fyri at finna, boða frá og kanna trygdarbrot. Tað er eisini umráðandi, at tit skjótt kunnu meta um, hvussu álvarsamt brotið er, av tí at freistirnar at boða frá eru stuttar.

Tað er eitt gott hugskot longu nú at gera av, hvør skal hava ábyrgdina av trygdini og fráboðanum um trygdarbrot.

**8. Er váðin høgur við viðgerðini hjá tykkum?**

**Tit eiga at kanna nærri um serligir váðar fyri tey skrásettu eru í sambandi við tykkara viðgerð av persónupplýsingum.**

Dátuverndarlógin byggir á eina váðagrundaða tilgongd. Hetta merkir, at jú størri váðin er við viðgerðini, jú hægri skal trygdin vera.

Í metingini av, um trygdarstøðið er hóskandi, skulu serlig atlit takast til teir váðar, sum standast av viðgerðini, herundir serliga møguleikanum fyri, at persónupplýsingar av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar, broyttar ella minka í virði ella at óviðkomandi fáa kunnleika til persónupplýsingar, sum eru sendar, goymdar ella á annan hátt viðgjørdar, misbrúka tær ella annars ólógliga viðgera tær.

Ávísar reglur í dátuverndarlógini – t.d. um avleiðingargreining og fyri privatar dátuábyrgdarar eisini reglurnar um yvirlit og dátuverndarfólk – eru bara galdandi um váðin við viðgerðini er høgur.

**9. Er dátuvernd bygd inn í tykkara KT-skipanir?**

**Tað er ein fyrimunur um tit longu nú hugsa um, hvørt dátuvernd er ella kann byggjast inn í tykkara skipanir. Serliga eiga tit at hava hetta í huga, um tit skulu hava nýggjar skipanir ella broyta verandi skipanir.**

Tað eru grundleggjandi meginreglur innan fyri dátuvernd, at tit ikki savna fleiri upplýsingar enn tit hava brúk fyri, at tit ikki goyma upplýsingarnar longri enn neyðugt, og at tit ikki nýta upplýsingarnar til onnur endamál enn tey endamál, sum tær eru savnaðar til.

At hædd verður tikin fyri hesum meginreglum í sambandi við nýggjar kt-loysnir ella broyting av verandi loysnum, hevur við sær, at tað verður lættari hjá tykkum at fylgja reglunum. At byggja dátuvernd inn í

skipanir verður nevnt dátuvernd gjøgnum sniðgeving og er ásett í dátuverndarlógini. Dátuverndarlógin setur tó ikki krav um at skifta kt-skipanir út í sambandi við, at dátuverndarlógin kemur í gildi 1. januar 2021.

Tá tit viðgera persónupplýsingar skulu tit eins og í dag seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini. Hvørji tiltøk skulu setast í verk er ein ítøkilig meting.

**10. Hvør hevur ábyrgdina av dátuverndarspurningum hjá tykkum?**

**Tit eiga at taka støðu til, hvør hevur ábyrgdina av dátuverndarspurningum. Í ávísum førum er eisini krav um dátuverndarfólk.**

Dátuverndarlógin setur krav um, at allir almennir myndugleikar og ávísar privatar fyritøkur tilnevna eitt dátuverndarfólk. Dátuverndarfólki skal vera við til at hækka um dátuverndina.

Tað eru tit, sum dátuábyrgdarar, sum hava ábyrgdina av, at reglurnar í dátuverndarlógini verða fylgdar. Dátuverndarfólki kann hjálpa tykkum við hesum.

Dátuverndarfólk er tað, sum á enskum verður kallað DPO (Data Protection Officer).

Dátuverndarfólki skal tilnevnast grundað á fakligan førleika, tó at tað ikki er nakað útbúgvingarkrav. Dátuverndarfólki skal m.a. ráðgeva um og halda eyga við viðgerð.

Eitt samtak kann velja eitt felags dátuverndarfólk. Almennir myndugleikar kunnu í samsvari við bygnað og stødd velja eitt felags dátuverndarfólk.

Tit eiga at taka støðu til, um tit eru fevnd av kravinum um at hava eitt dátuverndarfólk. Eisini eiga tit at taka støðu til, um tit hava starvsfólk, sum kann taka sær av hesi uppgávu ella um tørvur er á førleikamenning.